## Gravesen er liðugur

Danski landsilðsspælarin Thomas Gravesen var ikki partur av hópinum, tá Real Madrid um vikuskiftið riggaði seg til venjingarlegu í USA. Gravesen hevur longu tvær ferðir verið partur av roki í Real-leguni í summar, og tað er ikki nakað, sum venjarin, Fabio Capello, ætlar sær at góðtaka. Real Madrid hevur gjørt stórar íløgur í nýggjar spælarar, síðani Capello kom til í summar, og í miðlunum hevur leingi verið gitt, at Gravesen var ein av spælarunum, sum var á veg úr felagnum.

**-mørk**



## Rooney aftur útvístur

Bæði Wayne Rooney og Paul Scholes vórðu riknir av vølli, tá Manchester United um vikuskiftið vann 3-1 á FC Porto í venjingardysti. Rooney hevði eitt keðiligt farvæl til HM, tá hann varð rikin av vøllinum í dystinum hjá Onglandi móti Portugal, og nú enn eitt kort er komið á kontina, kann hetta fáa fylgjur. Í Onglandi verður nevnliga fylgt væl við, hvat fyriferst í venjingardystum, og nú verður agt, at Wooney er í vanda fyri at fáa leikbann í tríggjar dystir.

**-mørk**

KÍ-EB/Streymur 1-4 (1-1):

# KÍ gleið í svinginum

**EB/Streymur heldur framvegis kósina púrasta beina. Við at taka øll stigini í Klaksvík setti liðið eina feitu striku undir, at teir í løtuni eru so nógv tað besta boðið upp á ein komandi føroyameistara**



*Paul Clapson var saman við Christian Lundberg sera arbeiðssamur, men ofta merkti hetta eisini, at áleyparanir restaðu, tá bóltarnir vórðu spældir innfyri*

*Mynd: Álvur*

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nú farið verður undir seinasta triðingin av Formula-kappingini, er tað fyrst og fremst ein spurningur, sum øll vilja hava svarað: Megnar EB/Streymur at halda dampinum, soleiðis at fyrsta FM-heitið nakran tíð kann vinnast til høldar hjá felagsliðnum?

Tað hevur verið tosað um, at komandi fýra uppgerðirnar mest sum eru sannleikans tími í so máta. KÍ á útivølli, HB heima, B36 í Gundadali og so heima móti NSÍ. Fýra dystir, har EB/Streymur hevur møguleikan at senda argastu kappingarneytarnar av í svinginum, og júst hetta var eisini tað, sum hendi í Klaksvík leygardagin.

Karmurin kring dystin kundi illa verið nakað betri. Summafestivalurin saman við ósvikaliga áhuganum, sum fótbóltsspælið hevur í Klaksvík, syrgdu fyri úti við 1300 gjaldandi áskoðarunum, umframt at hópur av øðrum fólki eisini var til dystin.

Og stóran part av dystinum fingu tey eisini rættiliga gott undirhald. Bæði liðini kundu kanska skipað spælið betri, men nervin var fyri tað mesta rættiliga stórur og intensur.

Og hóast virðingin fyri mótpartinum avgjørt var til staðar, so var talan eisini um álopsfótbólt. Snøgt sagt, so vildu báðir partar vinna dystin, og við nógvum spæli út móti kantunum, vórðu lunnarnir lagdir til ein dyst, sum avgjørt kundi fara báðar vegir.

### Óhvast álop

At tað so kortini vórðu gestirnir, sum við einum rættiliga tryggum sigri fóru avstað við øllum, hevði sjálvandi sínar orsøkir. Fyrst og fremst, so tóktist tað, sum vildi EB/Streymur meira enn vertirnir. Hóast KÍ til tíðir hevði eina heilt fitta yvirvág í spælinum, so steðgaði spælið alt ov ofta upp, tá bóltarnir komu innfyri. Partvíst tí Christain Lundberg og Paul Clapson í ov stóran mun vóru at finna í borðunum, heldur enn at vera menninir, skuldu berjast um bóltarnar í feltinum. Og partvíst tí EB/Streymur enn einaferð prógvaði, at liðið hevur eina tí sterkastu miðverjuna í landinum.

Og at miðverjan dugdi annað enn bara rudda bóltar burtur, prógvaði Marni, tá hann var maðurin, ið legði EB/Streym á odda. Markeringin hjá KÍ sveik í deyðbóltsstøðu, og so kundi Marni mest sum flúgvandi stúta bóltin í kassan.

Og í hinum endanum var tað eisini ein verjuspælari, sum hevði avgerandi leiklutin, tá KÍ fekk javnvág íaftur. Altíð ungi Marek hevði dittað sær framvið, og tá hann rak inn í brotsteigin, varð hann heldur óneyðuga feldur, og so kundi Atli senda í kassan.

### Heppið mál avgjørdi

Útjavningin gav eisini KÍ alt betri mót upp á uppgávuna. Í løtuni undan steðgin tóktust teir trýsta nógv, og onkra ferðina brendi heilt nógv á framman fyri málið hjá EB/Streymi. Ta einu ferðina brast skot á stólpan, og í øðrum føri varð stútað beint fram við í góðari støðu.

Spakuliga fingu gestirnir tó aftur fatur um dystin, og tað gekk heldur ikki so long tíð, áðrenn teir sluppu at spæla upp á sínar premissur. Málið var kanska eitt dømi um, hvussu neyðuga hepnið ofta hevur hug at fylgja einum oddaliðið. Ronnie Samuelsen fekk einki serligt skot á, tá yngri bróðurin saman við Bárði Olsen skræddu KÍ-verjuna upp. Flestu mundu eisini halda, at Meinhardt hevði tamarhald á bóltinum, men onkursvegna sníkti bólturin seg umvegis stólparótina í kassan.

Og eftir hetta varð ongan tíð heilt vandamikið at vera EB/Sreymari. Mynstrið varð nú júst soleiðis, sum teir vildu hava tað. KÍ hevði bóltin nógv, men tá teir komu móti fýrkantaða teiginum, sótu gestirnir á tí allar mesta. Og við tveimum fínum kontramálum eydnaðist so eisini at drepa dystin. Ikki minst var tað fyrra av hesum ein sonn perla, tá Rafal legði inn fyri til Bárð, sum sera kontrolleráð lobbaði bóltin upp um málverjan við eini vakrari fyrstuferðs-røring.

### Eru favorittar

Sigurin ber við sær, at EB/Streymur nú er átta stig undan næstu liðunum, og tó at fleiri teirra spæla longu í morgin, so skerst ikki burtur, at tað nú sær ikki bara gott - men heilt gott – út hjá felagsliðnum. KÍ man í øllum førum ikki gera sær nakrar serligar vónir um at vinna oddin aftur, og komandi umførini fara so at vísa, um onnur kunnu gera sær slíkar.

Í øllum førum stendur oddaliðið í støðuni, har teir kunnu senda at kalla allar kappingarneytarnar langt burtur. Fyrsta settið í so máta var tað í Klaksvík, og so fæst at vita, hvussu tað fer at ganga, tá HB, B36 og NSÍ standa næst í røðini. 4-1 í Klaksvík var í øllum førum ein greið ávaring til hini liðini um, at EB/Streymur nú stendur so langt fremst í røðini, tá tosað verður um FM-biðlar.

## Nú tosa tey um gullið

Við tveimum málum var Ronnie Samuelsen avgjørt ein av monnunum, sum av álvara vóru í fokus, tá EB/Streymur tók eitt risa fet fram móti tí, sum alt meira líkist einum meistaraheitið til felagið.

Og hóast gullið ikki er nakað, sum tey í EB/Streymi hava tosað so hart um í ár, so tykjast spælararnir nú viðganga, at hetta er eitt evni.

– Tað hevur sæð gott út hjá okkum. Í steðginum hava vit tosað um, at vit nú hava fýra finalur. Altso dystir, har vit veruliga kunnu leggja sjógv til hini, um vit vinna, ella har vit kunnu tveita fyrimunin fyri borð, um vit kiksa. Dysturin í dag var tann fyrsti av hesum, og hesa uppgávuna loystu vit so.

Og eru tit so farnir at tosa um FM-møguleikan?

– Tað slepst illa undan tí spurninginum. Fólkið kring liðið hevur ikki tosað um annað hendan seinasta mánaðin, so vit kunnu illa ignorera tann møguleikan, sum vit hava.